

*KÍ í kreppu er vandamikið varð staðfest í leikskránni, og tað kunnu gøtumenn enn eina ferð skriva undir uppá*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Toppurin heldur sær væl

**Hundrað ára gamla KÍ syrgdi við sigri í Gøtu fyri, at sannlíkið fyri fyrstu niðurflytingini nakrantíð minkaði burtur í næstan einki, og avrikini hjá trimum teimum niðastu vóru meiri sannførandi, enn tey hava verið**

13. UMFAR SAMANUM
*Jóannes Hansen*

Vandin fyri at hundrað ára gamla KÍ í hesum kappingarárinum fyri fyrstu ferð nakrantíð skuldi flyta niður, hevur ikki verið heilt sørur. Eftir sigurin í Gøtu tykist vandin at vera burtur. Fimm umfør eru eftir at spæla, og tað eru níggju stig frá ÍF á næstaftasta plássinum og fram til KÍ, sum framvegis er á áttanda plássinum. Tað skal vilja verri enn illa til hjá KÍ, um teir skulu ganga tungu leiðina.

At KÍ í kreppu vinnur í Gøtu er meiri enn so komið fyri áður. Nýggjasta dømið er í 1996, tá ið venjarin tíðliga á árinum hevði blakað frá sær, tí onkrir spælarar ikki høvdu makkað rætt. KÍ hevði havt ógvuliga vánaliga byrjan upp á árið, men teir vunnu í Gøtu, og so vendi tað. Tvey ár frammanundan var støðan tann sama, sum hon var í 1996 og nú sunnudagin, og úrtøkan var allar ferðirnar sigur. KÍ í kreppu er vandamikið varð staðfest í leikskránni, og tað kunnu gøtumenn enn eina ferð skriva undir uppá.

Undan trettanda umfarinum vóru HB, Skála og B36 á trimum teimum fremstu plássunum. Øll hesi feløgini vunnu, og tá ið trý tey næstu á støðutalvuni - GÍ, NSÍ og EB/Streymur - einki fingu burturúr, tykist tað meiri upplagt, enn tað var undan sunnudegnum, hvørji feløg skulu vinna heiðursmerkini.

Síðani summarsteðgin hevur aftur og aftur verið tikið til, at leiðin hjá HB ímóti gullinum er vorðin alt sléttari. Hetta ber til at endurtaka enn eina ferð. Undan trettanda umfarinum høvdu kappingarneytarnir hjá meistaraliðnum seks dystir at vinna seks og átta stig aftur í. Nú hava Skála og B36 fimm dystir til hesa uppgávuna, ið tykist rættuliga torfør og tung.

Skráin hjá HB er henda: B68-HB, HB-B36, KÍ-HB, HB-GÍ og NSÍ-HB. Skráin hjá Skála er henda: B36-Skála, Skála-KÍ, GÍ-Skála, Skála-NSÍ og EB/Streymur-Skála. Skráin hjá B36 sær soleiðis út: B36-Skála, HB-B36, B36-VB, ÍF-B36 og B36-B68.

Talan er um tvær innanhýsis uppgerðir millum trý tey fremstu. Næsta sunnudag skulu B36 og Skála dystast í Gundadali, so verður frívikuskifti í landskappingini, tí Føroyar skulu spæla í Sveis og á heimavølli ímóti Fraklandi, og so verður grannadystur í Gundadali. Hann verður 12. september.

Fleiri ferðir áður er møguleikin nevndur, at tað skal eydnast HB at tryggja sær FM í triði síðsta umfarinum, tá ið teir skulu til Klaksvíkar. Tað er framvegis møguleiki fyri hesum. Men tað er eyðsýnt, at tað fer ikki at bera til hjá nøkrum av fremstu feløgunum at taka sær av løttum.

Hóast fuglfirðingar eru næstaftastir, so vístu teir sunnudagin í Gundadali, at tað ber væl til at tosa við oddaliðið. Toftamenn eru framvegis væl aftastir. Sunnudagin fáa teir vitjan av oddaliðnum, HB. Alt uttan trý stig til HB verður óvæntað. Men teir í B68 kunnu knýta seg í dupulta vón. Onnur er, at ÍF, sum teir kappast við fyri at sleppa undan niðurflytingini, var teimum gott fyridømi í Gundadali sunnudagin, og hin er, at B68 á Skála megnaði at spæla upp til liðið, sum á støðutalvuni er næstovast, og sum ofta í hesum kappingarárinum hevur verið mett at hava víst mest sannførandi leikligu avrikini.

Um B36 fer at vinna á heimavølli ímóti Skála, og um HB samstundis fer at fáa fult á Toftum, so verður fjarstøðan frá nummar eitt og til nummar tvey átta stig, sum skulu takast aftur í fýra royndum. Tað tykjast lítlir møguleikar at vera fyri, sjálvt um KÍ og NSÍ á heimavølli og GÍ á útivølli í Gundadali sjálvandi fara at gera alt tað, sum tað fer at bera teimum til, fyri at steðga HB.

## Tungur botnur

Við sigrinum á EB/Streymi tók VB seg upp um miðjuna. NSÍ og EB/Streymur eru á sætta og sjeynda plássinum. Við fullari úrtøku í Gøtu flutti KÍ burtur frá botninum og fram ímóti tøttu miðjuni. KÍ hevur ongan møguleika at vinna meistaraskapin og so at siga ongan møguleika at vinna heiðursmerkir. Fyri hundrað ára føðingardagsbarnið man tað kortini hava alstóran týdning at vinna betri endastøðu, enn tólv tey fyrstu umførini hava lagt upp til.

Avrikið í Gøtu bendi á, at liðið hjá klaksvíkingum hevur verið skeivt samanskrúvað. Veteranarnir hava havt ov smáar og skeivar leiklutir. Um teir verða eins væl upplagdir næstu ferðirnar, sum teir vóru í Gøtu, so er ikki óhugsandi, at KÍ fer at vinna onkran dystin afturat, og at teir fara at skava fleiri stig saman og harvið fara at hava møguleikan at lyfta sær longri frá botninum.

Eingin ivi er um, at B68 ella ÍF fara at flyta beinleiðis niður, og at hitt liðið skal spæla um plássið í deildini. Avrikini hjá báðum liðunum bendu í trettanda umfarinum á, at tað kanska fer at eydnast at skava okkurt stigið til sín. Tað er greitt, at triði síðsta umfarið fer at verða rættuliga týdningarmikið. Tá skal ÍF spæla á Toftum. Um hvørki av hesum báðum liðunum fer at fáa nakað annað stig afturat, so verður tað líka mikið, hvussu úrslitið í innanhýsis uppgerðini millum botnliðini fer at verða. B68 er fimm stig aftanfyri ÍF. Møguleikin fyri úrtøku tykist tvær tær næstu ferðirnar at vera størri hjá ÍF, enn tær síggja út at vera hjá B68. ÍF skal spæla á heimavølli ímóti VB og EB/Streymi, meðan B68 eigur heimavøll ímóti HB og útivøll í Vági.



# Renna 740 metrar uppeftir

**Eftir væleydnaða tiltakið í fjør, skipar MÍF aftur í ár fyri rennikapping ninðan á Sornfelli**

RENNING
*tíðindaskriv*

Tiltakið er sett á skránna 4. september, og tó at øll eru vælkomin, so minna fyrireikararnir á, at talan er um tunga brekku.

MIF top run varð runnið fyri fyrstu ferð tann 6. september 2003, og renningin má sigast hava vera væl umtókt longu frá byrjan. Heili 35 luttakarir høvdu melda seg til — og øll gjøgnumførdu renningina. 35 luttakarir er vanliga eitt hampuligt luttakaratal, og tá so eisini Skotland og Føroyar leiktu fótbóltslandsdyst um somu tíð, og hesin varð varpaður beinleiðis í út- og sjónvarpi, má sigast, at luttøkan var serstakliga góð. Fleiri av rennarunum høvdu enntá tikið lummaradio við fyri at hoyra dystin undir renningini!



*Í fjør varð Sigurð B. Justinussen fyrstur á málið. Hann rann teinin í tíðina, 46.15*

Vinnarin í 2003 hjá monnunum var Sigurð B. Justinussen, sum rann strekkið uppá 46m 15s, og hjá kvinnunum vann Tordis Debes Eiriksfoss við tíðini 1t 03m 50s.

Í mun til flestu aðrar motiónsrennikappingar, har man leggur teinin so slætt sum møguligt, er MIF Ttop runein eyka avbjóðing, við tað at teinurin er lagdur sum ein "móti brekku-renning". Renningin byrjar vid Statoilstøðina í Kollfjarðardali (fáar metrar yvir havinum) og endar á Sornfelli (uml. 740 metrar yvir havinum), eitt strekkið uppá 9,8 km.

Renningin verður býtt sundur í fýra bólkar: Menn undir 40 ár, menn yvir 40 ár, kvinnur undir 40 ár og kvinnur yvir 40 ár, trý tey fyrstu í hvørjum bólki fáa heiðursmerki. Teir fýra bólkavinnarirnir fáa eina kontantviðursløn uppá kr. 500,00 frá Føroya Banki. Harafturat verður lutakast, millum tey sum gjøgnumføra, um góðar vinningar frá HD.fo, Hotel Hafnia og øðrum, soleiðis at øll hava møguleika at fáa ein vinning við sær heim.

Tilmelding kann fara fram á netinum, og verður hetta gjørt á www.mjorkadal.com, men tað er eisini møguligt at melda seg til á staðnum, tá renningin fer fram.

Allir luttakarar, sum gjøgnumføra teinin, fáa eftir kappingina handað luttøkubræv.

# Nýtt svimjiár

Fyrsta svimjikappingin á árinum verður í Vági komandi vikuskifti.

Talan er um opna kapping, har svimjarar í øllum aldursbólkum taka lut, og fyrst og fremst, so verður talan um royndir at seta.

Tí hóast talan nú verður um nýtt svimjiár, so verður hendan kappingin roknað upp í árið 2003/2004, soleiðis at svimjarar, sum annars skuldu skift bólk, fáa enn ein møguleika at taka nakrar brotpartur av metunum.

Tað hevur áður víst seg, at hetta er ein framúr háttur at fáa svimjararnar ígongd aftur, eftir at teir annars hava verið í summarfrí.

44 kappingar eru á skránni, og seinasta freist fyri tilmelding er nú týsdagin.

Yvirlitið fyri komandi svimjiárið er nú eisini liðugt, og framgongur hetta aðrastaðni á síðunum

**-jm**

| Staður | Bólkar | Dagar | Heiti | Grand Prix v.m. |
|---|---|---|---|---|
| Klaksvík | 1, 2 og 3 | 18. og 19. september | Ægir-stevna | 50 og 100 frí |
| Vágur | 4, 5 og eldri | 24 til 26. september | Suðuroyar stevnan | 200 rygg, 200 frí og 200 blandað |
| Fulafjørður | 1, 2 | 15. og 16. oktober | FS-stevna | |
| Tórshavn | 3, 4, 5 og eldri | 30. og 31.oktober | HS-stevna | 400 blandað, 50 bringa og 50 frí. Útt. Til NJM |
| Leirvík | 1, 2 og 3 | 12. og 13. november | Reka-stevnan | 50 og 100 bringa |
| Klaksvík (Leirvík-Gøta-Fuglafjørður) | Nor.bólking | 26. 27. og 28. november | | Stórkapping |
| Klaksvík og Eysturoy. | | | | |
| Danmark | NJM | 3 - 5. desember | | |
| Tórshavn | 1 og 2 | 8. januar | HS-stevna | |
| Gøtu | 1, 2 og 3 | 5. og 6. februar | Skeggjar-stevna | 50 og 100 rygg |
| Klaksvík | 4 og eldri | 12 og 13 februar | Ægir-stevna | 800 og 1500 frí, 200 bringa 200 firvald, 50 rygg og 50 firvald |
| Vágur | 1, 2 og 3 | 26. og 27. februar | TS-stevna | 50 firvald og 100 blandað |
| Toftir | 1, 2 og 3 | 11. og 12. mars | Flot-stevna | |
| Tórshavn | 3, 4, 5 og eldri | 2 og 3 apríl | HS-stevna | 100 blandað, 100 frí, 100 rygg, 100 bringa, 100 firvald |
| Klaksvík | UM | 22., 23. og 24 apríl | UM | |
| Vágur | SUM | 30. apr og 1. mai | SUM | |
| Tórshavn | FM | 5. 6. og 7. mai | FM | |
| Shetland | | 9. til 15. juli | Oyggjaleikir | |
| Klaksvík | opin | 27. og 28. august | Metkapping | Seinasti møguleiki at seta met í árinum |

# Fram framvegis niðarlaga

**Bæði íslendsku feløgini við føroyskum spælarum megnaðu javnleik á útivølli, og serliga Julian Johnsson og liðfelagarnir harmaðust um, at teir mistu trygga leiðslu**

ÍSLAND
*Jóannes Hansen*

Julian Johnsson og liðfelagarnir í Akranesi hava ikki havt marginalirnar á sínari síðu tær báðu seinastu ferðirnar. Í fjúrtanda umfarinum áttu teir heimavøll ímóti meistaraliðnum KR. Úrslitið var málleysur javnleikur. ÍA hevði yvirvág, men tað eydnaðist teimum ikki at fáa mál. Tættast við vóru teir, tá ið Julian Johsson við høvdinum smekkaði bóltin í tvørtræið.

Hesa ferð var ÍA á Hafnafirði, har tað leingi gekk væl á Kaplakrikavøllinum. ÍA legði seg framum bæði 1-0 og 2-0, men so mistu teir ein mann, tí hann hevði fingið tvey gul kort, og í 65. og 73. minutti skoraði heimaliðið.

Stigamissurin hjá ÍA ber við sær, at møguleikin fyri at vinna meistaraskapin, sum teir so ógvuliga fegnir hava viljað vunnið, so at siga hvar. Tað eru trý umfør eftir at spæla, og FH er seks stig frammanfyri ÍA.

FH er framvegis oddalið, men kappingarneytarnir tóku seg inn á teir. Fylkir vann 3-1 á útivølli á Víkingi, og ÍBV vann trivaligan 5-2 sigur í Keflavík.

Hitt føroyska útisetafelagið, Fram, er framvegis í stórum vanda fyri at missa plássið í bestu deildini. Hesa ferð vóru teir á Akureyri, har tað endaði málleyst. Sambært íslendskum fjølmiðlum var heimaliðið omaná, og Framararnir vóru hepnir at sleppa suður aftur á land við einum stigi.

Fram er framvegis niðanfyri niðurflytingar strikuna. KA er aftast, Fram næstaftast, og Grindavík, sum í gjárkvøldið skuldi spæla í Reykjavík ímóti KR, er triðiaftast.

Sunnudagin skal ÍA, sum er á fjórða plássinum, spæla á heimavølli ímóti Keflavík, og Fram skal spæla á heimavølli ímóti KR.

**Danska superligan**

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Silkeborg | 4 | 3 - 0 - 1 | 10 | 6 | 4 | 9 |
| 2 OB | 4 | 2 - 1 - 1 | 9 | 5 | 4 | 7 |
| 3 Brøndby (S) | 4 | 2 - 1 - 1 | 5 | 3 | 2 | 7 |
| 4 Viborg | 4 | 2 - 1 - 1 | 5 | 5 | 0 | 7 |
| 5 Herfølge | 4 | 2 - 1 - 1 | 3 | 3 | 0 | 7 |
| 6 FCM | 4 | 2 - 0 - 2 | 5 | 7 | -2 | 6 |
| 7 AGF | 4 | 1 - 2 - 1 | 6 | 5 | 1 | 5 |
| 8 Esbjerg | 3 | 1 - 1 - 1 | 6 | 4 | 2 | 4 |
| 9 FC Nordsj. | 4 | 1 - 1 - 2 | 6 | 7 | -1 | 4 |
| 10 FCK (M) | 4 | 0 - 3 - 1 | 7 | 8 | -1 | 3 |
| 11 AaB | 4 | 1 - 0 - 3 | 5 | 6 | -1 | 3 |
| 12 Randers FC | 3 | 0 - 0 - 3 | 1 | 9 | -8 | 0 |

Føroyskir leikarar: Todi Jónsson (FCK)

**Danska 1. deild**

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Skjold | 3 | 3 - 0 - 0 | 8 | 3 | 5 | 9 |
| 2 HIK | 3 | 2 - 1 - 0 | 8 | 3 | 5 | 7 |
| 3 Frem | 3 | 2 - 1 - 0 | 6 | 2 | 4 | 7 |
| 4 Fredericia | 3 | 2 - 0 - 1 | 10 | 2 | 8 | 6 |
| 5 Vejle | 3 | 2 - 0 - 1 | 12 | 6 | 6 | 6 |
| 6 Sønderj. E | 3 | 2 - 0 - 1 | 10 | 6 | 4 | 6 |
| 7 Fremad A. | 3 | 2 - 0 - 1 | 6 | 2 | 4 | 6 |
| 8 AB | 3 | 2 - 0 - 1 | 6 | 6 | 0 | 6 |
| 9 Køge | 3 | 1 - 2 - 0 | 14 | 6 | 8 | 5 |
| 10 AC Horsens | 3 | 1 - 0 - 2 | 4 | 4 | 0 | 3 |
| 11 NFA | 3 | 0 - 2 - 1 | 5 | 9 | -4 | 2 |
| 12 B 93 | 3 | 0 - 2 - 1 | 6 | 11 | -5 | 2 |
| 13 Næstved | 3 | 0 - 1 - 2 | 4 | 8 | -4 | 1 |
| 14 Brønshøj | 3 | 0 - 1 - 2 | 3 | 11 | -8 | 1 |
| 15 Ølstykke | 3 | 0 - 1 - 2 | 1 | 12 | -11 | 1 |
| 16 Dalum | 3 | 0 - 0 - 3 | 2 | 13 | -11 | 0 |

Føroyskir leikarar: Gunnar Nielsen Jón Rói Jacobsen (Frem), Jann Ingi Petersen, Andrew av Fløtum, Hjalgrím Elttør (Fremad Amager), Johan Byrial Hansen (AC Horsens)

**Danska 2. deild**

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Brabrand | 3 | 2 - 1 - 0 | 68 | 43 | 25 | 7 |
| 2 Jetsmark | 3 | 2 - 1 - 0 | 68 | 43 | 25 | 7 |
| 3 B 1913 | 3 | 2 - 0 - 1 | 60 | 34 | 26 | 6 |
| 4 Kolding FC | 3 | 2 - 0 - 1 | 54 | 41 | 13 | 6 |
| 5 Glostrup | 3 | 2 - 0 - 1 | 62 | 42 | 20 | 6 |
| 6 B 1909 | 3 | 2 - 0 - 1 | 55 | 48 | 7 | 6 |
| 7 Holstebro | 3 | 1 - 1 - 1 | 54 | 47 | 7 | 4 |
| 8 Hjørring | 3 | 1 - 1 - 1 | 51 | 47 | 4 | 4 |
| 9 Lyngby | 3 | 1 - 1 - 1 | 46 | 74 | -28 | 4 |
| 10 Slagelse | 3 | 1 - 1 - 1 | 53 | 57 | -4 | 4 |
| 11 Kalundborg | 3 | 1 - 0 - 2 | 51 | 62 | -11 | 3 |
| 12 Næsby | 3 | 1 - 0 - 2 | 39 | 59 | -20 | 3 |
| 13 Værløse | 3 | 1 - 0 - 2 | 57 | 64 | -7 | 3 |
| 14 Roskilde | 3 | 1 - 0 - 2 | 48 | 62 | -14 | 3 |
| 15 Aarhus Fr. | 3 | 0 - 1 - 2 | 49 | 61 | -12 | 1 |
| 16 Holbæk | 3 | 0 - 1 - 2 | 32 | 62 | -30 | 1 |

Føroyskir leikarar: Christian Holst Lamhauge (Lyngby)

**Íslendska Landsbankadeildin**

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 FH | 15 | 7 - 7 - 1 | 23 | 14 | 9 | 28 |
| 2 Fylkir | 15 | 7 - 5 - 3 | 22 | 15 | 7 | 26 |
| 3 ÍBV | 15 | 7 - 4 - 4 | 28 | 17 | 11 | 25 |
| 4 ÍA | 15 | 5 - 7 - 3 | 20 | 16 | 4 | 22 |
| 5 Keflavík | 15 | 6 - 3 - 6 | 21 | 26 | -5 | 21 |
| 6 KR | 14 | 4 - 7 - 3 | 16 | 14 | 2 | 19 |
| 7 Víkingur R | 15 | 4 - 3 - 8 | 15 | 20 | -5 | 15 |
| 8 Grindavík | 14 | 3 - 6 - 5 | 14 | 19 | -5 | 15 |
| 9 Fram | 15 | 3 - 5 - 7 | 16 | 18 | -2 | 14 |
| 10 KA | 15 | 3 - 3 - 9 | 10 | 26 | -16 | 12 |

Føroyskir leikarar: Julian Johnsson (ÍA), Fróði Benjaminsen og Hans Fróði Hansen (Fram)